

## Tingfólk í landsdystum

Løgtingsfólkini, Karsten Hansen, John Johannesen, Hans Pauli Strøm, Helgi Abrahamsen, Eyðgunn Samuelsen og Kári P. Højgaard eru løtuni í Moskva og spæla innandurafótbólt í kapping, sum russiska parlamentið, Duman, skipar fyri. Kappingin er millum parlament í Evropa, og Føroyar eru komnar í bólk C saman við Lettlandi og Ukraina. – Vit trúðu satt at siga ikki upp á innbjóðingina. Men nú eru vit her og tað er veruligt. Tað hevur verið ein gevandi og góður túrur. Hava spælt tveir dystir. Tann fyrra ímóti Ukraina. Og eg kann siga, at vit eru við fyri at læra, og taptu 7-0 ímóti teimum, og ímóti Lettlandi taptu vit 1-2, staðfestir John Johannesen, løgtingslandsliðleikari. Føroyska málið gjørdi Hans Pauli Strøm. Tað er Duman, parlamentið í Russlandi, sum skipar fyri kappingini, og russisku vertirnir rinda bæði uppihald og ferðing. Fyrr í vikuni var upplýst, at orsøkin til at tingfólkini eru farin at spæla fótbólt í Russland, er fyri at hava tað stuttligt og fyri at koma í samband við onnur parlament í Evropa.

# Eingin grund til panikk



*Umboð fyri manningarfeløgini sita í nevnd og arbeiða við nýggjum hugskotum um, hvussu inntøkutrygdin hjá fiskimonnum kann broytast*

**- Lógin um inntøkutrygd fiskimanna virkar, og tá er tað líka mikið, um pengingur er settur á fíggjarlógina – ella ikki. Eg haldi, at fiskimenn kunnu vera púra róligir, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen**

INNTØKUTRYGD

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*

Í tíðindasending hjá Kringvarpinum í gjár skiltist, at inntøkutrygdin hjá fiskimonnum siglir sín egna sjógv. Landsstýrið vil hava ferð á málið um broytingar í inntøkutrygdini, og tí er eingin peningur sett av á fíggjarlógini fyri 2010. Hetta merkir, sambært Kringvarpinum, at skipanin, sum er galdandi í dag, verður óvirkin á nýggjárinum.

Ein nevnd við umboðum úr øllum manningarfeløgunum er sett at arbeiða við inntøkutrygdini. Nakrir fundir hava verið, men nevndin er enn ikki komin undir land við sínum arbeiði.

Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, segði við Kringvarpið í gjár, at arbeiðið at broyta skipanina við inntøkutrygd fiskimanna skuldi verið byrjað fyrr, og eisini skuldi ein "glíðiskipan" verið galdandi, soleiðis at stundir vóru til møguligar tillagingar í skipanini.

- At kappa á stokkinum er nakað ógvusligt, legði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag aftrat.

### Eingin panikkur

Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, er við í nevndini, sum er sett at arbeiða við broytingum í inntøkutrygdini.



*Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, heldur onga grund vera til panikk, tó at landsstýrið onga krónu hevur sett av á fíggjarlógini fyri 2010 til inntøkutrygd fiskimanna. – Gamla skipanin heldur fram, um vit ikki finna semju um broytingar, sigur hann*

Hann heldur ikki, at nøkur grund er til panikk, sum hann tekur til.

- Líkamikið, um peningur er settur av á fíggjarlógini ella ikki, er lógin um inntøkutrygd kortini galdandi. Soleiðis noyðist tað almenna eisini at gjalda tað, sum fiskimenn sambært lógini hava krav upp á, um einki annað er samtykt til ta tíð.

Tað ræðir ikki Viberg, sum hann sjálvur tekur til, at eingin peningur í løtuni er settur av í framlagda fíggjarlógaruppskotinum til inntøkutrygd fiskimanna.

- Ætlan landsstýrisins er at broyta alla inntøkutrygdina. Ein nevn er sett at koma við uppskoti um broytingar. Megnar nevndin at hava eitt uppskot klárt, sum kann fremjast í verki, áðrenn fíggjarlógin fyri komandi ár verður endaliga samtykt, verður tann skipanin sett í verk.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag sigur seg eisini hava skilt, at megnar nevndin ikki at semjast um eina nýggja skipan, heldur gamla skipanin við inntøkutrygd fram.

- Hesum eri eg rættiliga vísur í, leggur Viberg Sørensen aftrat.

### Ymiskar nýhugsanir

Reiðarafelagsformaðurin sigur, at ymiskar nýhugsanir eru komnar fram um, hvussu inntøkutrygd fiskimanna kann skipast øðrvísi.

- Koma vit undir land við eini øðrvísi skipan enn henni, sum er galdandi í dag, er ilt at siga í løtuni, hvat hon kemur at kosta. Tí er eingin peningur settur av á fíggjarlógini til inntrygd í løtuni, sigur Viberg Sørensen.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag er tó sannførdur um, at inntøkutrygdin hjá fiskimonnum kemur at halda fram – so ella so.

- Nei, her eigur eingin panikkur at vera í, tí galdandi lóg er virkin, tó at eingin peningur er settur av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010, sigur Viberg Sørensen.

# Jón Magnus fyri sjeyndu ferð í Smiðjuni

**Teir 40 málningarnir, sum argjamaðurin, Jón Magnus Joensen, hevur á framsýning í Smiðjuni í Lítluvík teir næstu dagarnar, eru til sølu fyri millum 1.000 og 11.000 krónur**

LIST

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hann hevði sína fyrstu málningaframsýning, tá hann var umleið 20 ára gamal. Nú hann er 46, er hetta sjeyndu ferð, hann alment sýnir fram sína list. Í 2002 gekk hann listaskúla í Holdbæk.

Klokkan 14 í dag læt Jón Magnus Joensen upp málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini hevur hann 40 málningar við motivum úr náttúruni uttan fyri bøgarðarnar, um vit so kunnu siga.

- Hesaferð havi eg valt ikki at taka bygdaløg við, men havi bevíst lagt meg eftir at mála tað, sum liggur uttanfyri bøgarðarnar.

Jón Magnus sigur, at umleið helmingurin av teimum 40 málningunum eru av ymiskum landsløgum her úr umhvørvinum í Suðurstreymi, meðan hin helmingurin meira eru hugmyndir úr náttúruni.

Málningarnir hjá Jón Magnusi Joensen eru litfagrir, og stílurin er lættur og livandi.

Hann málar við akryl, og sjálvur sigur listamaðurin, at hann hevur brúkt umleið eitt hálvt ár til at mála málningarnar til hesa framsýningina.

Málningaframsýningin í Smiðjuni í Lítluvík er opin vanligar dagar umframt sunnudagin frá klokkan 14-19, og leygardagin frá klokkan 10-19.

Framsýningin hjá Jón Magnusi Joensen er opin til og við komandi týsdag.

Prísirnir fyri teir 40 málningarnar liggja úr 1.000 krónum upp í 11.000 krónur.



*Jón Magnus Joensen er 46 ár, og hetta er sjeyndu ferð, hann sýnir fram síni listaverk*

*Mynd: Jens Kr. Vang*